*Framhald av síðu 25*



*Tað kostaði Shell dýrt, tá teir í 1995 vildu sleppa sær av útslitna oljuboripallin, Brent Spar*

øðrum londum til framleiðsluna, og noyddi fyritøkurnar at taka sær annað skinn um bak.

Í bókini verða mong onnur dømi nevnd, og nógv verður gjørt burtur úr tí vaksandi valdinum, sum grasrótarørslur hava. Fyritøkurnar lata við seg koma skjótari og skjótari. Tað tók 20 ár við trýsti frá brúkarunum at fáa Barcleys Bank at taka seg úr Suðurafrika, men Shell flutti Brent Spar eftir fáum mánaðum, og tað tók bara eina nátt hjá Mark&Spencer at taka genviðgjørdan mat av hillunum.

Munurin millum stórfyritøkurnar og politikararnar er, at fyritøkurnar hava ikki ráð at hava ónøgd viðskiftafólk, serliga ikki um kundarnir gerast aktivt ónøgdir.

## Teir Progressivu og Teir Grønu

Spurningurin er so, um grasrøtur og mótmæli kunna broyta politikkin, eins og tey smátt um smátt seta dagsskránna hjá stórfyritøkunum? Kunna mótmæli trýsta politikararnar til aftur at seta fólksins áhugamál fremst? Kunna mótmæli noyða politikararnar til at venda aftur til veruligt demokrati og eggja til ófalsað orðaskifti millum flokkarnar og til ein politikk, sum fylkir veljararnar? Kunna mótmæli endurstovna tað umboðandi demokratiið sum eitt forum, har ymiskir sosialir tørvir verða vigaðir upp móti hvørjum øðrum, har alt ikki verður kroyst saman til at vera vinna ella einstaklingur? Kunna mótmælini gera sítt til, at vit uppfinna statin av nýggjum? spyr Noreena Hertz.

Hon svarar: *"Søgan sigur okkum, at tað ber til. Bæði demokratiskar stjórnir og fyritøkur hava brúk fyri breiðum stuðli fyri at yvirliva, og tað gevur fólkinum ómetaliga stórt vald at seta treytirnar fyri, hvussu hetta samstarvið skal skipast."*

Fyrst í 20. øld kundi USA fegnast um eina vælferð, sum minnir um okkara. Eftir 30 árum var landbúnaðarframleiðslan tvífaldað, kolaframleiðslan fimmfaldað og ráoljuframleiðslan tíggjufaldað. Kortini fingu bøndurnir minni fyri vøruna, og nøkur fá feløg vóru um at fáa ræðið á allari ídnaðarframleiðsluni. Sterkir politikarar í kommunum, statum og í Washington góvu feløgunum fyrimunir, so at teir afturfyri fingu stuðul til sítt maktapparat. Fjølmiðlarnir avdúkaðu kammirátarí og korrupsjón millum fyritøkur og politikarar. Bløðini vóru avtakin við greinum og lesarabrøvum, sum spottaðu Rockefeller og Carnegie og aðrar "røvarabarónar".

Fólk kendu seg ótrygg og vórðu ill. Grasrøturnar ásannaðu, at korrupsjón og monopol høvdu ringar avleiðingar fyri áhugamálini hjá almenninginum. Býir og bygdir gingu saman í eina sjáldsama fylking, og í fólkinum vaknaði eitt krav um broytingar. Borgararættindafelagsskapir vórðu stovnaðir við tí endamáli at bøta um húsaneyðina í býunum, at stríðast fyri teirri vónleysu støðuni hjá teimum fátæku og at berjast ímóti misbrúki av politiskari og búskaparligari makt. Bólkar vórðu skipaðir, sum kravdu rættindi fyri kvinnur og arbeiðsmenn, og brúkararnir noktaðu alt meira at keypa vørur, sum børn høvdu framleitt av neyð. Veljararnir kravdu størri vald, og tað fekk ávirkan. Ein lóg móti korrupsjón kom í gildi, og amerikanarar fingu eina nýggja valskipan, sum fyriskrivaði, at veljararnir og ikki valfeløg skuldu kjósa valevnini. Ein skipan um fólkaatkvøður kom í gildi og ein skipan, sum gjørdi tað møguligt at koyra korruptar ella ódugnaligar embætismenn frá.

Í 1912 stillaði ein nýggjur flokkur upp til kongressvalið: teir Progressivu við fyrrverandi forsetanum Theodore Roosevelt sum formanni. Undir valstríðnum segði hann:

*"At oyðileggja hesa ósigrandi stjórnina, at dálka hesa óhalgu samgonguna millum korruptar fyritøkur og korruptar politikarar, er fremsta uppgávan hjá einum statsmanni í dag."*

Flokkurin fekk 25% av atkvøðunum við einari valskipan, har tað næstan er ógjørligt hjá triðjaparti at koma framat. Flokkurin hevði ta ávirkan, at hinir flokkarnir fóru at stríðast ímóti, at stórfyritøkurnar skuldu hava valdið á politikkinum. Fyri fyrstu ferð varð skipað eftirlit gjørt fyri vinnulívið, flokslciðararnir fingu minni vald og fólkið meira.

Í kjalarvørrinum av Vietnamkrígnum sóu vit fimti ár seinni, at radikalisman varð endurfødd. Hesa ferð fevndi hon um landamørk. Krøv um frið, víðkað borgararættindi, kvinnufrígering og mótstøða móti rasismu vóru bara nøkur mál, sum elvdu til kravgongur, sum ikki áttu sín líka, bæði í London og Washington og vóru um at íbirta kollvelting í Fraklandi í mai 1968.

Ein avleiðing av øllum hesum var stríðið ímóti dálking. Teir gomlu flokkarnir fingu dálking við í stevnuskránna, og í fleiri londum vórðu grønir flokkar skipaðir. Teir Grønu fingu so við og við umboðan í mongum vesturevropeiskum parlamentum og í Evropatinginum, teir hava nú í skjótt nógv ár sitið í stjórn í Týsklandi og hava eisini sitið ella sita í stjórn í Fraklandi, Belgia, Italia og Finnlandi. Hesir flokkar vístu seg at duga sera væl at leggja niður markaskjøl millum høgra og vinstra, og eins og teir Progressivu í Amerika hava Teir Grønu dugað væl at vunnið veljarar, sum áður vóru trúfastir móti teimum gomlu flokkunum.

Líkskapurin millum teir amerikansku Progressivu, evropeisku umhvørvisrørsluna og dagsins hendingar er eyðsýndur: fólk eru vónbrotin av myndugleikunum og vraka tann gamla politikkin, eru illgrunasom mótvegis stórfyritøkunum, eru fús at fara út á gøturnar at mótmæla, nýta brúkaratrýst sum politiskt og búskaparligt vápn, leypa gamalt orðaskifti um búskap um og tosa heldur um lívsvirði, duga at sameina idealismu við egináhugamál og eru ikki knýtt at flokspolitikki, sum er grundaður á stættastríð.

Tey góðu úrslitini hjá teimum Progressivu og umhvørvisfólkunum siga okkum, at myndugleikarnir *kunna* lata við seg koma, men enn er ógreitt, um teir *vilja* lata mótmælini móti Teirri Tigandi Kollveltingini við seg koma. Í ein vissan mun er hetta við at henda. Fyrrverandi franski forsætisráðharrin Jospin mælti til at stovna ein Heimsumfatandi Umhvørvisfelagsskap. Clinton helt røðu í Belgia beint eftir 11. september, har hann segði, at *"tað kann ikki góðtakast, at heimurin hevur eitt slag av reglum fyri tey ríku og eitt annað slag fyri tey fátæku"*. Sum formaður í ES mælti fyrrverandi belgiski forsætisráðharrin Verhofstadt til *"heimsumfatandi bindandi avtalur um etikk og umhvørvi"*. Í Bretlandi stríddist Arbeiðaraflokkurin fyri at lækka kostnaðarstøðið.

Tað tykist sum at flokkarnir stúra fyri øktari fólksligari mótstøðu og so smátt ásanna, at kapitalisman hevur fingið ov víðar ræsur. At flóðin lyftir ikki øll før, at stórfyritøkurnar eru kanska vorðnar ov sterkar. At tað er tíð uppá at skúgva ta ráu kapitalismuna hjá Reagan og Thatcher frá sær. Sosialt rættvísi kann aftur gerast politiskur móti – í hvussu so er hjá mið- og vinstraflokkunum.

Higartil hava tað mestsum bara verið vøkur orð, men ongar gerðir. George Bush hevur í sínum politikki sett áhugamálini hjá vinnulívinum fremst. 350 miljardir dollarar í skattalætta, sum tey ríku fingu gagn av. Eftirlit við umhvørvinum viknað og royndarboringar á íshavsleiðum. Minni eftirlit við vinnuni, serliga oljuvinnuni. Lobbyistar frá flogfeløgunum fingu at vita frá republikanarum í Kongressini, at teir máttu av ideologiskum orsøkum styðja sjónarmiðið hjá republikanarum um ikki at nasjonalisera trygdina á flogplássunum. Bush hevur ikki viljað góðkent Kyoto-avtaluna um umhvørvið, hann hevur ikki viljað skrivað undir eitt uppkast um at dagføra Konvensjónina um biologisk vápn frá 1972, hann er ímóti Altjóða Straffirættardómstólinum, og hann vildi ikki góðkenna ST-sáttmálan um forboð móti at spjaða hondvápn, tí hann vardi amerikanskar vápnaframleiðarar. Landið, har vandarnir við Teirri Tigandi Kollveltingini eru størstir, er eisini landið, har stjórnin sjálv gagnar kollveltingini.

Skula myndugleikarnir møta avbjóðingini frá Teirri Tigandi Kollveltingini muga teir læra av royndunum hjá teimum Progressivu og umhvørvisfelagsskapunum, tá teir leita eftir loysnum. Teir muga brúka sítt vald til at krevja lýdni frá fyritøkunum. Teir muga vinna sambandið við fólkið aftur og virka fyri at geva fólkinum størri vald, millum annað við at nýta nýggja tøknifrøði til at spyrja fólkið til ráðs. Teir muga minnast til, at fólk ynskja ikki longur eina verð, har alt snýr seg um vakstrartøl og kapitalstreymar, har ójavnin bara veksur. Miseydnast alt hetta, skriva myndugleikarnir í roynd og veru undir sín egna deyðadóm. Heimurin, vit liva í, verður so stýrdur av stórfyritøkunum, marknaðurin fer at standa oman fyri lógina, og politisk val